LØGTINGIÐ

Finnur Helmsdal, løgtingsmaður
her

Landsstýrismálanevndin

**27. mars 2008**
**j. nr. 7.13-20080003[2] ks/td**
(at tilskila í svari)

*Sagt verður frá, at soljóðandi skriv í dag er sent Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni:*

**”Áheitan frá Finni Helmsdal, tingmanni, um, at nevndin tekur málið um innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg til viðgerðar**
Við skrivi, dagfest 12. mars 2008, hevur Landsstýrismálanevndin fingið áheitan frá Finni Helmsdal, tingmanni, um, at nevndin tekur málið um innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg til viðgerðar.

Málið varð viðgjørt á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 26. mars 2008.

Av tí, at málið er reist í sambandi við ófráboðaðan fyrispurning í tinginum, fyriliggur einki tilfar, sum nevndin kann nýta at gera eina meting av, hvørt rímilig grund er at halda, at brot er framt á lóggávuna.

Fyri at kunna gera eitt tilmæli sum grundarlag fyri eini meting av, um Fiskimálaráðið - við fyrrverandi ella verandi landsstýrismanni - hevur røkt sínar skyldur á fullgóðan hátt, hevur Landsstýrismálanevndin gjørt av, at biðja landsstýrismannin í fískivinnumálum um at fáa innlit í málið, herundir søguna hjá nevnda ella nevndu fiskiloyvum.

Svarfreistin er sett til 14. apríl 2008.

Avrit av hesum skrivi er sent Finni Helmsdal, tingmanni, til kunningar.”

N.v.

Heidi Petersen
formaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901